Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Høgni Hoydal, løgtingsmaður

Svarari: Bárður á Steig Nielsen, løgmaður

Evni: Um týðandi uttanríkispolitiskar avgerðir og ráðførslur við Uttanlandsnevndina sambært stýrisskipanarlógini

Spurningar:

1. Hví hevur tann arktiska strategiin hjá Føroyum, sum landsstýrismaðurin í uttanríkismálum legði fram fyri øll heimsins lond í Reykjavík í seinastu viku, ikki verið til ráðførslu í Uttanlandsnevndini hjá Løgtinginum?

2. Hví hevur tann rammuavtalan um fiskivinnusamstarv, sum landsstýrismaðurin í uttanríkismálum undirskrivaði við Ísland í seinastu viku, ikki verið til ráðførslu í Uttanlandsnevndini hjá Løgtinginum?

3. Heldur løgmaður, at landsstýrismaðurin í uttanríkismálum heldur ásetingarnar í stýrisskipanarlógini um týðandi uttanríkispolitiskar avgerðir, sum skulu til ráðførslu í Uttanlandsnevnd Løgtingsins?

4. Hvussu hevur løgmaður í hesum málum útint sína eftirlitsskyldu við, at landsstýrisfólk fyrisita á lógligan hátt?

5. Hvør er tann politiska grundgevingin fyri ikki at viðgera slík mál í Uttanlandsnevndini?

Viðmerkingar:

Í stýrisskipanarlógini er ásett, at landsstýrið skal ráðføra seg við Uttanlandsnevnd Løgtingsins í øllum týðandi uttanríkispolitiskum avgerðum. Endamálið er sjálvsagt, at føroyskur uttanríkispolitikkur er kjølfestur í tí føroyska fólkaræðinum umvegis fólkavalda Løgtingið – og at einstøk landsstýrisfólk ikki taka avgerðir eftir egnari persónligari ella partapolitiskari hugsan – sum so kunnu skifta og broytast, alt eftir hvør situr í landsstýrinum.

Í seinastu viku fingu tingfólk boð gjøgnum fjølmiðlarnar um, at landsstýrismaðurin í uttanríkismálum hevði lagt fram eina arktiska strategi fyri Føroyar fyri umboðum úr øllum heimi á ráðstevnuni Arctic Circle í Reykjavík. Talan er um eitt sera týðandi mál fyri Føroyar og okkara altjóða samstarv. Hartil fingu tingfólk boð um, at ein sonevndur rammusáttmáli var undirskrivaður millum Føroyar og Ísland um fiskivinnu. Eisini eitt sera týðandi uttanríkispolitiskt mál.

Tí verður spurt, hvussu ráðførslurnar hava verið í hesum málum, og um rætt er farið fram.

Á Løgtingi, 21. oktobur 2022

Høgni Hoydal